## DAGSINS MEINING

# Nýt trygdarbeltið!

Í hesum døgum hevur ferðsluløgreglan gjørt ymsar kanningar, har serligur dentur hevur veirð lagdur á nýtsluna av trygdarselum. Tað er óhugnaligt at frætta, hvussu ring støðan er á hesum øki.

Tað fara at verða eini 20 ár síðani, at nýtsla av trygdarselum varð lógarfest í Føroyum. Tá vóru okkara lógarsmiðir framman fyri lógarsmiðir í grannalondum, við tað at kravið var, at øll í bilinum skuldu nýta trygdarbelti.

Tað er kortini sera løgið, at líkasælan er so stór á hesum øki. Serliga tá vit vita, at vantandi nýtsla av trygdarselum kostar mannalív. Hetta er bara ein óreingiligur sannleiki. Spurningurin, sum hvør einstakur okkara kann seta sær er: Skal tað verða tú ella eg, sum skal doyggja?

Ráðið fyri ferðslutrygd ger eitt stórt upplýsandi arbeiði á hesum øki. Ikki minst við Null-hugsjónini, sum eisini hevur vunnið inn um tinggátt – og sum er við í øllum arbeiði, sum løgting og landsstýri gera á ferðsluøkinum.

Henda hugsjón gongur í stuttum út upp á, at eingin skal doyggja ella verða illa skaddur í ferðsluni. Hetta er ein hugsjan, sum sjálvandi krevur av okkum, at vit taka hana til okkum - og hugsa um hana! Vit eiga t. d. hvørja einastu ferð vit seta okkum í bilin, at nýta tey bæði sekundini, tað tekur, at binda okkum í. Tað skal vera líka mikið, hvussu langt vit ætla at flyta bilin - og tað skal vera líka mikið, hvussu stóran vit meta vandan verða fyri at koma fyri vanlukku. Gera vit hetta hvørja einastu ferð, so er tað ein so fastur vani, sum ongan vansa hevur við sær.

Vit eiga eisini at hava í huga, at vit kunnu koma øðrum fólkum í óføri, um vit ikki binda okkum sjálvi í. Tí eitt lutvíst lítið mistak hjá onkrum øðrum, kann tá elva til at tú sjávlur missir lívið - og at onkur annar skal liva við hesum restina av lívinum - hóast tað kundi verið øðrvísi, um bara tú nýtti tey bæði sekundini, tað tekur, at binda teg í selan.

Ilt er at læra gamlan hund uppi at sita, sigur gamalt orð. Men viðvíkjandi nýtslu av trygdarselum, so eru »gomlu hundarnir« tey, sum eru oman fyri 40. Øll undir 40 hava livað við galdandi reglum um nýtslu av trygdarbelti. Tí er tað BARA ein spurningur um hugburð, um at halda lógina og um virðing av okkum sjálvum og okkara medmenniskjum.

Tí kunnu vit samtykkjandi taka undir við boðunum frá Ferðslutrygd: Nýt trygdarbeltið!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vegasambandið í Lorvík millum tunnlarnar

**Jógvan E Joensen**
*Leirvík*

Nú nærkast í stórum til tað »brestur fyri nevn« millum Leitini, og eitt ár seinri skal verða koyrandi. Ferðslan kemur í fyrstu syftu at ganga gjøgnum bygdina í tættbygdum øki við tveimum vegamótum og íkomuvegum. Hetta er ikki nøktandi loysn í longdini, hvørki fyri bygdarfólkið ella fyri landsins myndugleikar.

Nógvar ymiskar loysnir hava verið nevndar, so sum tunnlar, brýr, vegir og nú koyrirenna (lokrenna) ella koyrigrøv (undirgrøv).

Tað eru helst 3 partar ið hava serligan áhuga á eini loysn av hesum máli.

1. Hjá norðingum er nokk fremsta hugsanin, hvussu koma vit ígjøgnum Lorvík? Um tað verður omaná, undir ella mitt ígjøgnum, tað er helst ikki tann stóri trupulleikin fyri teir.

2. Landsverk/landsstýrið hevur helst sum fremsta mál, at gera eina rímiliga bíliga loysn, um ikki kravboð frá Løgtinginum koma um nakað annað, eina loysn, sum kann nøkta tann vantaða tørvin til ferðslu í framtíðini.

3. Lorvíkar bygdaráð burdi haft sum fremsta mál, at fingið eina loysn, sum kann gagna bygdini best í framtíðini, og helst órógva sum minst.

Fyrsta tunnilsloysnin sum fráfarna bygdaráð mælti til, var ein tunnil undir bygdini, sum helst hevði órógvað bygdina minst, men annað gagn sum so hevði hon neyvan haft. Hesin tunnil var mettur at kosta 54 mill. og eftir hvat man hevur frætt, skuldi hetta vera í dýrara lagi fyri Landsverk, og er tað helst tí, at teir eru komnir við øðrum alternativum loysnum, sum hava kunnað fingið skjóta og positiva viðgerð, um tikið hevur verið við hesum uppskotum. Seinri eru komnar ymiskar aðrar undarførslur fyri at hesin tunnil ikki er besta loysnin, millum annað at tilfarið skal vera sera vánaligt, og at tunnilin má liggja rættuliga djúpt. Hvussu nógv hald er í hesum tíðindum veit eg ikki, heldur ikki um nakrar kjarnuboringar hava verið gjørdar, men vitandi er um onkrar hissini omanjarða dýpdarmátingar. Í hvussu er og ikki, sær tað út til at bæði nýggja Bygdaráðið og Landsverk hava slept hesari loysnini, sum gamla bygdaráðið royndi at halda fast um, sum einastu og frægastu loysnina.

Uppskotið hjá Landsverk um at gera veg gjøgnum besta byggilendi í bygdini, eru helst allir lorvíkingar meir ella minni ímóti. Tað er bert ein orsøk hjá Landsverk at mala til at gera tann vegin, og hon er tann at tað er helst bíligasta loysnin fyri landið, men helst ein vánalig loysn fyri Lorvík.

Triðja loysnin, sum talan hevur verið um er »Fjøruloysnin«, har tað hava verið ikki minni enn 3-4 ymisk hugskot, umframt brúgvaloysnin, sum er ein brúgv millum báðar pirarnar, har smærri skip kunnu sigla undir. kanska ikki tann dummasta loysnin, men neyvan tann bíligasta.

Seinasta útspælið frá bygdarráðnum, – hesum nýggja – er ein 400 metur long lokrenna gjøgnum fjøruna og havnarlagið. Tað ljóðar at tað er eitt samt bygdarráð, sum stendur aftanfyri hesari loysnini. Tað er nokk ein pástandur sum skal takast við fyrivarni. Bygdarráðslimir vóru kanska samdir um at gera eina kanning av hesari loysnini, men samdir eru teir neyvan – heldur enn bygdafólki annars – um at hettar er besta loysnin fyri bygdina, annars hava fleiri teirra 2 tungur í sama heysi. Men eitt er so tað, at hon lýkur fyrsta útspælið frá gamla bygdaráðnum um ein tunnil (ella onkrum sum líkist tunnli) og so er ikki lopið frá fyrsta tilmælinum. Eitt tilmæli sum summir bygdarráðslimir, sum rímuligt er, hava eitt sindur ilt við at víkja frá, fyri ikki at vera vingluskøltar. Hendan ætlanin sigst kosta 75 mill. ella 10 mill. meir enn fyrsta loysnin, sum segðist vera í so kostnaðarmikil.

Hetta lokrennuarbeiðið kemur at órógva nógv meðan arbeitt verður, serliga á havnaøkinum, har alt dekkið má brótast upp og havnin tømast í longri tíð. Nakað av gagni fyri bygdina Lorvík, er ringt at fáa eyga á. Ein atløgusíða verður tó t.d. á Toftanesi til smærri bátar, tí grunt er. Norðara og sunnara havnaøkið fáa eitt eyka vegasamband, tað er so tað. Neyvan nakað prýði fyri fjøruna. Nakað av bilóljóði fyri tey innastu og uttastu húsini. Og norðingar, ja teir koma 30 sekund skjótari gjøgnum bygdina.

Men eftir er so ein loysn – um talan skal vera um veg – sum ein lítið og onki hevur hoyrt um, hvørki frá bygdarráði ella Landsverki. Tað er at fara so langt niðan um bygdina við vegnum, sum eitt forsvarligt hall loyvir. Tá eru vit komnir niðan á Brekkir, umleið har sum núverandi uppdyrkingarvegur liggur. Um ein hugsar um byggilendi, hevði ein slíkur vegur gjørt minst árin, um hann lá í sjálvum brekku-jarðanum inneftir, omanfyri Bygdarhúsið, og so á skák oman aftur í tunnilsvegin. Er hallið ov nógv at koma omanaftur í núverandi tunnilsveg, er møguleiki at gera ein tunnilsstubba inn í Líðabrekkuna og fáa fatur í núverandi tunnil. Tá sleppur ein undan at gera eitt stórt skemmandi »grótbrot« til rundkoyring, og eventuelt taka gomul søgulig hús niður, sum talan hevur verið um. Bygdin hevði fingið ein »ókeypis« veg, sum skal koma fyrr ella seinri. Fólk kunnu so sjálvi velja hvussu nær tey vilja byggja við ein slíkan veg, og nógv byggilendi er omanfyri vegin til bæði eitt og annað, at freista teim sum ferðast framvið við einumhvørjum, sum hoyrir nútíðini ella framtíðini til. Útsýnið har er frálíkt.

Tá tað er landsins myndugleikar sum hava tað endaliga orðið í hesum leiki, fari eg at biðja teir um eisini at umhugsa hesa loysnina áðrenn seinasta orðið verður sagt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.